FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

**Fundarfrágreiðing frá stýrisfundi 25. februar 2013:**

**Dagur og klokkutíð**: Mánadagur 25. februar 2013

**Fundarstaður**: KT- deildin, J.C. Svabos gøta 7

**Til staðar**: Herálvur Joensen, stýrisformaður, Jan Mortensen, næstformaður, Tove Bull, Birna Gaard, Juanna Joensen, Sára Joensen, Gestur Hovgaard, stýrislimir, Sigurð í Jákupsstovu, rektari og Jørgen Meitilberg, fyrisitingarstjóri

Herálvur bjóðaði vælkomin og greiddi frá, at Mentamálaráðið hevur gjørt av, at allir uttanhýsis valdir stýrislimir halda fram til tess at varðveita kontinuitetin í stýrinum.

**1. Góðkenning av dagsskrá**

- Dagsskráin varð góðkend.

**2. Góðkenning av fundarfrágreiðing frá seinasta fundi (fundarfrágreiðing 311012)**

- Fundarfrágreiðingin varð góðkend.
- Stýrið gjørdi tó vart við, at seinasta fundarfrágreiðing kom alt ov seint út. Tí varð heitt á fyrisitingarstjóran um at senda stýrislimunum uppskot til fundarfrágreiðing í seinasta lagi sjey dagar eftir fundin.
- Fundarfrágreiðingin skal góðkennast av stýrinum í seinasta lagi fjúrtan dagar eftir fundin, vanliga gjøgnum teldupost.

**3. Nýggja Setursstýrið skipar seg**

- Stýrið skipaði seg við Herálvi Joensen sum formanni og Jan Mortensen sum næstformanni.
- Herálvur Joensen gjørdi vart við, at hóast hetta er fyrsti fundurin hjá nývalda stýrinum, so hevur stýrið umvegis teldupost evnað til tilmæli um limir í Búskaparráðið. Tilmælið var latið landsstýrismanninum í fíggjarmálum í januar mánað.

## 4. Gjøgnumgongd av stýrandi skjølum (reglugerð fyri skipan, reglugerð fyri stýrið)

- Stýrislimirnir, ið eru nývaldir, høvdu verið á forfundi saman við rektara, fyrisitingarstjóra og stýrisformanni í vikuni fyri stýrisfundin. Tá vórðu nøkur av stýrandi skjølunum gingin ígjøgnum. Tí varð lítið gjørt burturúr hesum á stýrisfundinum. Kunnað varð tó um, at ætlanin er at eftirmeta innanhýsis reglur av hesum slagnum á seinasta stýrisfundinum í árinum.

## 5. Ársuppgerð 2012 (fíggjarfrágreiðing 2012)

- Hugin Skaalum legði ársuppgerðina fyri 2012 fram.
- Seinasta uppgerðin vísir, at Fróðskaparsetrið hevur eitt avlop á 394.844 kr., men ávísar reguleringar eru síðani gjørdar, og væntandi verður avlopið umleið 50.000 kr. fyri 2012. Í løtuni stendur inntøkan frá inntøkufíggjaðum virksemi á tveimum kontum, einari fyri SSD á 1.4 mió.kr. og einari fyri SFD á 1.2 mió.kr.
- Virksemið á Granskingardeplinum er munandi minni enn undanfarin ár. Karin Jóhanna L. Knudsen er farin undir ph.d. lestur, og Dennis Holm er vorðin borgarstjóri í Vági. Umráðandi er, at minkandi virksemi á Granskingardeplinum ikki gongur út yvir undirvísingarpartin á SSD.
- Sum væntað eru 1.5 mió. kr. meiri brúktar á Náttúruvísindadeildini til lønarútreiðslur enn í 2011, meðan Sjúkrarøktarfrøðideildin hevði eitt avlop á 500 t.kr. Hetta ger, at útreiðslurnar til lønir á Megindeildini fyri náttúruvísindi og heilsu er 1 mió.kr. størri í 2012 enn í 2011.
- Setrið er noytt til at alokera meiri til lønir í mun til keyp av vørum og tænastum.
- Setrið og almennir stovnar fáa ikki kompensatión fyri vaksandi lønarlag, hetta setur eyka trýst á játtanina í longdini.
- Fyrisitingin arbeiðir í løtuni við at gera ein býtislykil fyri inntøkufíggjað virksemi, væntandi er arbeiðið liðugt í mars 2013.
- Fyrisitingin hevur eisini sett seg í samband við Fíggjarmálaráðið um at Setrið fær ikki endurgoldið MVG av útlendskum verkætlanarpengum. Slík regla kann gerast ein forðing fyri stuðli, tí ofta verður treyt sett um, at stuðulin skal vera avgjaldsfríur.

## 6. Fíggjarætlan 2013 (yvirskipað fíggjarætlan 2013)

- Sigurð í Jákupsstovu legði fíggjarætlanina fyri 2013 fram.
- Játtanin fyri 2013 er 67.252 t.kr. og meðan hon var 68.797 t.kr. í 2012. Hetta er ein minking á 1.545 t.kr.
- Virksemið á Setrinum er skipað í tríggjar høvuðspostar, megindeildirnar og setursskrivstovan.
- Uppskot til Fíggjarætlan 2013.

| | Lønir | Vørur og tænastur | Keyp av útbúnaði | Leiga, viðlíkah. o.a. | Stuðul til útl. | Søla** | Innanh. flyt. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Megindeildin hug/sam/nám | 32.200 | 3.400 | | | | 900 | 1500 |
| Megindeildin náttúru/heilsu | 16.712 | 1.500 | | | | 100 | |
| Setursskrivstovan* | 10.356 | 2.100 | 1.100 | 2.528 | 100 | 500 | |
| | | | | | | | |
| Stýrið | 256 | | | | | | |
| | | | | | | | |
| **70.252** | 59.524 | 7.000 | 1.100 | 2.528 | 100 | 1.500 | 1.500 |
| **67.252** | | | | | | | |
| | | | | | | | |

- * Setursskrivstovan, KTT, Stovnar á Debesartrøð, Altjóða skrivstovan
- ** Søluinntøkurnar sera óvissar – megindeildirnar at meta um – taka atlit til tøl fyri GD.

- Sundurbýtið millum høvuðspostarnar verður tikið á leiðslustigi. Dekanarnir hava síðani ábyrgd av, hvussu játtanin á megindeildini verður býtt innanhýsis millum deildirnar.
- Leiðslan er farin undir at kanna, hvussu Setrið kann fáa eina betri tvørgangandi undirvísing millum deildirnar, t.d. gagnnýta undirvísingarorkuna betur.
- Tosað varð um ætlanirnar at leggja Búskaparráðið til Setrið. Stýrisformaðurin legði dent á, at tað er umráðandi at fylgt verður væl við fíggjarligu gongdini og at samlaða játtanin verður hildin.

## 7. Strategiarbeiðið (framløga ið lýsir strategitilgongdina)

- Rektarin kunnaði um strategiarbeiðið higartil.

- Strategiarbeiði er neyðugt til tess at finna felags stev og fáa undirtøku í samfelagnum og frá politisku skipanini. Strategiarbeiðið, ið varð gjørt í 2009/10, verður eisini tikið við arbeiðið.
- Strategiarbeiðið higartil varð lagt fram á innanhýsis fundi á Østrøm fríggjadagin 22. februar. Ætlanin er, at yvirskipað strategiskjal skal verða klárt í mars, og sendast til innanhýsis hoyring á Setrinum ultimo mars. Í mai eigur eitt meiri liðugt orðað strategiskjal og avrikssáttmáli at fyriliggja, sum síðani verður lagt fram á stýrisfundi til góðkenningar.
- Birna Gaard mælti til, at lesandi onkursvegna verða meiri sjónlig í strategiini.
- Kunnað varð um, at ein viðmerking frá kunningarfundinum fríggjadagin 22. februar var, at fyrisitingin ikki sæst aftur í strategiini.
- Fyrisitingin arbeiðir við at kortleggja, hvat Setrið framleiðir av granskingartilfari.
- Rektarin kunnaði um uppskot til tilverugrundarlag sum sigur, at Setrið framtíðartryggjar føroyska samfelagið og skapar fólka- og búskaparvøkstur. Stýrið heldur, at skrivið er ambitiøst, men tað ger einki. Somuleiðis varð nevnt, at orðingin "... og skapar fólka- og búskaparvøkstur" kanska var ov nógv at fylgja tíðarrákinum – tann fyrra helvtin var betri, tí hon var tíðarleys. Jan Mortensen mælti til, at strategisku orðingarnar verða so einfaldar sum møguligt, soleiðis at starvsfólk minnast til strategiina í sínum dagliga virki. Tað er eisini umráðandi at kunna máta úrslitið, annars ber ikki til at siga nakað um, hvørt strategiin ger mun. Um hesi viðurskifti verða tikin við, so er strategiin eitt sera gott amboð.
- Formaðurin spurdi um, hvussu nógv fulltíðarlesandi ganga á Setrinum í løtuni. Hetta er torført at svara, av tí at hagtalsskipanin ikki tekur nóg neyvt hædd fyri fráfalli gjøgnum lestrarárið. Arbeitt verður við at bøta um hendan trupulleikan. Tað er ikki beinleiðis samsvar millum tølini frá Setrinum og Studna, tí Studni bert roknar við lesandi, sum fáa stuðul. Tað eru fleiri lesandi á Setrinum, sum ikki fáa stuðul. Ein leys meting er umleið 600 lesandi.

**8. Avrikssáttmáli 2013-2015 (uppskot til avrikssáttmála)**

- Rektarin legði fram uppskot til avrikssáttmála, ið er partur av strategiska menningararbeiðnum.

- Í uppskotinum til avrikssáttmála er sett upp ein røð av málum, sum skulu røkkast fram til 2015.
- Ætlanin er at bjóða út eina løgfrøðiliga masterútbúgving í summar. Avtalað varð, at fyrisitingin sendir stýrislimunum uppskotið til hoyringar skjótast gjørligt, soleiðis at stýrið kann taka avgerð um útbúgvingina. Setrið hevur sent eina áheitan um góðkenning av útbúgvingini til landsstýrismannin í mentamálum, tí sambært lóg skal landsstýrismaðurin góðkenna útbúgvingar, sum verða bodnar út á Setrinum.
- Kjakast var um málini í avrikssáttmálanum. Avrikssáttmálin verður gjørdur millum leiðsluna og stýrið um mál fram til 2015.
- Neyðugt at útgreina málini betur.
- Tá megindeildirnar vórðu skipaðar í 2012, var avgerð tikin um at varðveita deildarleiðarar  til tess at tryggja kontinuitet í eini skiftistíð, í 1 ár fyri fyrst. Ætlanin er í næstum at eftirmeta arbeiðsbýtið millum dekanar og deildarleiðarar.
- Gestur Hovgaard helt, at fakliga dimensjónin er fráverandi í verandi strukturi á Setrinum. Hann ynskti eitt nú, at deildirnar verða fakliga styrktar við “studienevnum”, og við fakligum ábyrgdarpersónum (fakleiðarum)
- Rektarin kunnaði um ætlanina um, at vísindafólk lata dekanunum ársætlanir, ið yvirskipað greina arbeiðsskránna eitt ár fram, býtt upp á trý høvuðsøki: gransking, undirvísing og fyrisiting/annað. Ein vansi kann vera, at starvsfólk kenna ársætlanir sum kontroll. Tí er neyðugt at greiða nærri frá, at talan fyrst og fremst er um eitt amboð hjá dekaninum at fáa yvirlit yvir arbeiðsorkuna og tískil er talan um eitt amboð at skipa virksemið á Setrinum.
- Arbeitt verður við at gera eitt yvirlit yvir vísindaligu framleiðsluna á Setrinum.
- Sára Joensen sóknaðist eftir, at fyrisitingarparturin eigur at hækkast javnt við vøksturin av vísindastarvsfólki, tí uppgávurnar veksa samsvarandi.
- Herálvur Joensen kunnaði um skriv, sum er sent frá 30 lesandi á SSD til stýrið, 20 av teimum verða liðug við BA-lestur í summar. Heitt verður á stýrið um at bjóða út eina masterútbúgving á SSD, tí hetta varð sambært teimum lovað við lestrarbyrjan. Stýrið heitti á leiðsluna um at kanna málið. Leiðslan tekur málið upp skjótast gjørligt.

- Dekanurin á Megindeildini fyri hugvísindi, samfelagsvísindi og námsvísindi hevur fingið eitt tilmæli frá SSD um at skipa fyri meistaralæru á SSD. Leiðslan tekur málið upp.
- Málið fyri 2014 er at hava 800 fulltíðarlesandi. Hetta er eitt ambitiøst mál, tí hetta krevur nýggjar útbúgvingar, og at takast skal inn á øllum deildum á hvørjum ári.
- Avrikssáttmálin verður væntandi klárur at leggja fram til góðkenningar á næsta stýrisfundi.
- Arbeitt verður við at styrkja sambandið til vegleiðarar í miðnámsskúlunum til tess at styrkja marknaðarføringina soleiðis, at so mong sum møguligt velja Setrið eftir lokna skúlagongd á miðnámsskúlunum.
- Formaðurin og rektarin fara á fund við Mentamálaráðið 6. mars, m.a. fyri at kunna um framtíðarætlanir hjá Fróðskaparsetri Føroya.

- Í ár verða hesar útbúgvingarnar bodnar út fyrstu ferð
    - Bachelor útbúgving í orku- umhvørvisverkfrøði (b.sc.),
    - Masterútbúgving í jura
    - Vegleiðaraútbúgving, master (samstarv við HÍ) 2013

**9. Kunningarmál:**

1. **Upptøka í 2013 (marknaðarføring, tíðarætlan .. )**
   Fyrisitingarstjórin kunnaði um upptøkuna 2013.

2. **Gallup kanning (spurningar)**
    - Gallup kanning verður fyrireikað til tess at varpa ljós á myndina, sum fólk hava av Setrinum. Kanningin skal eisini brúkast til at gera eina meiri miðvísa marknaðarføring av Setrinum sum heild. Fyri at avmarka kanningina eru spurningarnir savnaðir um trý høvuðsøki, tey eru:
        - Umdømi/image hjá Setrinum
        - Vitan um virksemið á Setrinum
        - Samfelagsluttøka hjá Setrinum

3. **Nýggj útbúgvingarkunngerð (útkast til kunngerð)**

- Fyrisitingarstjórin kunnaði um arbeiðið við at orða útbúgvingarkunngerðina
- Hon verður send til hoyringar á deildunum tá hon er dagførd.

4. **Birna Gaard kunning, ráð teirra lesandi, val av lesandi til stýrið, annað,**
   - Mælti til at umboð fyri tey lesandi í stýrinum fylgja skúlaárinum, tí lesandi á síðsta ári verða eisini vald í stýrið.
   - Valluttøkan skal vaksa til komandi ár, ein valluttøka á 25% er ov lág. Valið skal gerast meiri spennandi.
   - Lesandi skulu gerast partur av eftirmetingini av útbúgvingunum á Námsvísindadeildini.
   - Arbeiðið við at seta á stovn Ráð teirra lesandi er byrjað, tveir fundir hava verið, men luttøkan er ikki góð. Tey sóknast eftir, at leiðslan meldar út, hvørjar heimildir og mandat ráðið skal hava. Semja er um, at málið verður tikið upp við fyrisitingarstjóran.
   - Setrið eigur at gera meira fyri at bøta um trivnaðin hjá lesandi. Á NÁD er trivnaðurin góður tá lesturin byrjar, men tá komið er longur í lesnaðinum verður samveran minni og minni.
   - Mælt verður til, at Setrið tekur støðu til rakstur av matstovuni, tí matstovan ber seg ikki fíggjarliga, men tað er spell fyri Setrið um matstovan dettur niðurfyri.

5. **Ráðstevna um lívfrøðiligt margfeldi - 16 mai**

   Fróðskaparsetur Føroya, Søvn Landsins og Búnaðarstovan skipa fyri ráðstevnu um, hvussu lívfrøðiligt margfeldi kann varðveitast við burðardyggari lendisnýtslu. Ráðstevnan verður í Norðurlandahúsinum hósdagin 16. mai. 2013

6. **Setursdagur verður 17 mai:**

   Í samband við ársdagin (20 mai) verður skipað fyri almennum tiltaki at varpa ljós á granskingar- og útbúgvingarvirksemið á Setrinum.

7. **Undirkonta til eftirútbúgving (einki tilfar)**

- Í ár fer Setrið at bjóða út eina vegleiðaraútbúgving, sum er grundað á samstarv millum Fróðskaparsetur Føroya og Háskóla Íslands (HÍ). Útbúgvingin er ein yvirbygningur á masterstigi, ið byggir á aðra viðkomandi útbúgving, ið minst er á bachelorstigi. Útbúgvingin verður fíggjað av undirkontuni til eftirútbúgving, sum Mentamálaráðið hevur ræðisrætt á.

**10. Annað**

- Gestur Hovgaard gjørdi vart við, at teldutrygdin á Setrinum er alt ov strong. Tað átti ikki at verið neyðugt hjá einum kt-vørði at koma yvir á SSD at dagføra eitt nú Java. Verandi skipan er stirvin og er við til at skapa óneyðuga ónøgd.
- Stýrið tók avgerð um at leggja næstu stýrisfundirnar soleiðis:
    - 4. juni
    - 23. september
    - 27. november

Skrivað hevur Jørgen Meitilberg